

# Vinnuhúsið á “Vestaru Vág” handað

Jan Müller

12.09.2013 - 13:10

Oljan.fo

Á miðdegi í dag varð arbeiðið við at klæða vinnuhúsið á “Vestaru Vág” formliga liðugt, og avtalan millum ánara og byggiharran um yvirtøku undirskrivað.

“Vit gleðast um, at arbeiðið hevur gingið so væl, og at kostnaðarætlanin hevur hildið”, sigur Jónsvein Lamhauge havnameistari og leggur afturat, at “nú farið verður at projektera innrættingina, er umráðandi, at vinnan heldur seg fram at, eitt nú skulu vit hava eitt matarstað í bygninginum, og Tórshavnar havn ætlar ikki at reka matarstaðið. Tað má vinnan gera”.

Í vinnuhúsinum á ”Vestaru Vág”, er ætlanin at hýsa fyritøkum, ið hava atknýtt virksemi til sjóvegis vinnu.

Fyrimunirnir er eyðsýndir, tí hetta verður staðið, har vitan miðsavnast. Hetta ger, at smærri fyritøkur í størri mun kunnu nýta sínar kjarnuførleikar og bert í minni mun nýta tíð

til umsitingarligt arbeiði. Ítøkiliga merkir hetta at møguleikar eru fyri:

- Felags fundar- og ráðstevnumøguleikum
- Felags post, kopiering og print
- Felags matarhøll
- Felags telefonansan
- Felags reingerð
- Felags alnetsamband
- Atgongd til altjóða vitan og fundarhøli uttanlands

Harumframt eru aðrir minni ítøkiligir fyrimunir:

- Netverk til aðrar í vinnuni
- Vitanardeiling
- Ein inngongd hjá møguligum íleggjarum
- Vakurt nýinnrættað umhvørvi at bjóða sínum kundum

Eisini vil vinnuhúsið á“Vestaru Vág” virka fyri, at leigarar hava møguleika fyri altjóða samstarvi. Hetta verður framt við, at vinnuhúsið á “Vestaru Vág”arbeiðir fyri limaskapi í Enterprise Europe Network. Harumframt arbeiðir vinnuhúsið á “Vestaru Vág” við at skapa atgongd til líknandi altjóða virkishús, ið trygt kunnu veita holla ráðgeving á ymiskum landafrøðisligum marknaðum, verður sagt í tíðindaskrivi frá Tórshavnar Havn